miðvikan
Nr. 191 • 07. oktober 2009
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

**Ingibjørg Hansen:**

# Lívið aftaná skaðadagin í Hesti

**Í fyrra partinum greiddi Ingibjørg Hansen frá, tá ið hon misti pápan stóra skaðadagin í Hesti í 1919 og um tíðina aftaná. Men lívið heldur áfram, og hesum greiðir Ingibjørg frá í hesum seinna partinum**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**2. partur**

## Aftur at rógva út

Í Hesti byrjaðu menn aftur at rógva út aftaná skaðadagin. Tað var einki annað at gera. Tað hevur altíð fiskur verið keyptur í Hesti, men tann, sum tá keypti fisk, man hava verið pápi Jóan Kristian, Poul, sum hevði handil. Fiskurin varð flaktur og saltaður, og hetta gav nakað av arbeiði.

Seinni var tað Hans Jacob Niclasen, sum tók ímóti fiski, og tað gjørdi hansara handil inntil nýggjari tíð. Ræsti fiskurin úr Hesti var jú kendur!

Bjørgini vórðu eisini søkt, men tað burdi tey kanska ikki, tí tey vóru so leys og vandamikil.

Men teir, sum vóru ungir og yvirlivdu skaðadagin, teir fóru í bjørgini. Millum aðrar var Hans David í Fagrastovu ein so óførur bakkamaður. Teir tóku bæði lunda og havhest og eisini annan fugl.

Vit fingu landpart av fugli í mun til ta jørð, vit áttu. Tað sama var, táið teir fóru eftir eggum. Men tað var nú ikki tað stóra, sum hetta gav av sær.

Men táið systur mín Óluva giftist við Johan Zachariassen, og hann lá heima eitt summarið, fingu vit nógvan fugl.

## Gott ferðasamband

Tað, eg kann minnast, hevur altíð verið hampuligt samband út í Hest við mjólkabáti. Dúgvan hjá mjólkaforsýningini sigldi tvær ferðir um vikuna úr Havn. Tí lá tað eisini væl fyri at senda mjólk til Havnar.

Men var brúk fyri tí, fekk mamma altíð onkran at føra seg um fjørðin til Velbastaðar. Tað tók bert eina løtu við báti yvirum, og so fór hon til gongu til Havnar. Hetta tók um tveir tímar. Tá var eingin vegur. Vit máttu fara niðan gjøgnum Steinabrekku, hon er tung at ganga. Hetta fýrdu fólk tó ikki fyri tá í tíðini.

Tað var gott samband millum fólk í Hesti og Velbastað. Tað vóru fleiri giftur millum fólk í hesum bygdum.

Tað hevur eisini verið eitt livandi samband millum Hest og Havnina. Tað vóru jú hestkonur, sum vóru giftar til Havnar og havnarkonur, sum vóru giftar út í Hest.

Omma míni, Poulina, var úr Havn. Pápi og Poli í Dali vóru systkinabørn.

Omma skrivaðist Kjeld sum genta, og tað var vist langabbin, sum var ein av hesum konstablunum, sum komu til Føroyar at arbeiða á skansanum. Hann var norðmaður og skrivaðist Jens Kjeld.

Tað var altíð so væl millum húsini hjá okkum og hjá Margrethu og Sigmund Arge. Hetta hevur verið vegna sama skyldskapin.

Hetta komst eisini av mostir, Amaliu, sum giftist til Havnar við Nikláa Skála. Tey búðu í sama grannalagi.

Abbi og omma tín, Poli skómakarin og Malla, búðu eisini har, og eg kendi tey. Eg kendi eisini Lisu hjá Pola, mammu tína, sum var nøkur ár eldri enn eg.

## Skúlin

Í skúlanum vóru vit umleið 20 børn. Vit vóru tveir klassar. Vit høvdu góðan skúlagang. Tá ið eg fór í skúla bleiv Malvina Clementsen lærarinna. Hon var so einastandandi. Hon var ættað úr Húsavík, fødd í 1895. Hon var so lærari øll míni skúlaár.

Maður til systur mína var eldri. Tá ið hann gekk í skúla skiftu lærararnir so ofta. Eina ferð var Poul Titus Samuelsen úr Kirkjubø lærari. Eina tíð var eisini Bjarnadal har úti.



*Flogmynd av Hesti*

Malvina var ein deilig lærarinna, men hon legði nógv á børnini. Vit fingu fyri bæði at lesa og skriva, men vit lærdu eisini nógv. Vit lósu lærubók (katekismus), bíbliusøgu, geografi og danmarkssøgu. Málllæru vil eg slett ikki tala um. Tað gekk hon høgt uppí, bæði danska og føroyska mállæru. Seinni fingu vit kirkjusøgu og heimssøgu afturat.

So var eisini eksamin. Prósturin kom út og helt eksamiu. Eisini komu yvirlærarar úr Havn til tað sama.



*Ingibjørg Hansen*

## Samband við Koltur

Vit høvdu nógv samband við Koltur. Lærarinnan átti eina viku av hvørjum mánaða í Koltri. So kundi tað henda, at hon ikki slapp aftur fyri veður. Tá kundu hon vera 14 dagar í Koltri út í eitt. Men fyri tað sluppu vit ikki at taka okkum av løttum í Hesti. Hon gav okkum ríkiligt fyri bæði at lesa og rokna.

Tá eg var ung, vóru Niclas og Karin bóndafólk í Koltri. Ein sonur teirra var kendi bátasmiðurin Niklas í Koltri. Feðgarnir vóru báðir bátasmiðir. Tað búðu eini 24 fólk har úti tá í tíðini.

Tá koltursfólk kom í Hest, vóru tey ofta hjá okkum, tey gistu eisini, tá tørvur var á tí. Teir plagdu eisini at koma í Hest við fiski at avreiða.

Koltursmenn skóru alt sítt torv í Skopun. Tað var nevniliga einki torv í Koltri. Teir máttu tískil føra torvið við báti.Var ivaveður, kundu teir støðga í Hesti eftir líkindum, og fóru so heilt tíðliga avstað.

Hestmenn skóru eisini sítt torv í Skopun til bátarnir gingu burtur í 1919. Torvið í Skopun var so nógv betri. Tað gjørdist verri torv, fólk fingu, tá tey bert skóru í Hesti.